## Grønlendingar í málneyð

Nógvir grønlendingar, sum fara til Danmarkar, hava ilt við at skilja tað danska mkálið og at tosa tað, og tað kann mangan vísa seg at vera sera óheppið og heldur ikki sørt vandaleyst. Britta Gjelstrup, sum er leiðari á verkstaðnum Oqqumut í Esbjerg, sigur við blaðið JydskeVestkysten, at grønlendingar, sum skulu tosa við ein málsviðgera ella ein lækna í Danmark, eiga at hava rætt til at hava tulk hjástaddan. Britta Gjelstrup ásannar, at hetta hendir ikki ofta, men vísir á, at tað kann hava sera óhepnar avleiðingar, at partarnir ikki skilja hvør annan.



## Gravarar hildu fund

Tað er ikki á hvørjum degi, at kirkjugravarar hittast til fundar, men á danska býnum Jenved var nú ein dagin fundur millum einar 100 gravarar, sum arbeiða við ymsar kirkjur í Ribe biskupadømi. Dagurin var samstundis skipaður sum eitt skeið, tí har vóru ikki færri enn 23, sum nýliga eru byrjaðir í gravarastarvinum, og sum tí skuldu hava eitt sindur av læru og vegleiðing. Gravararnir eru ikki bara gravarar, men skulu eisini halda kirkjuugarðar og gravir við líka, og tað kann vera krevjandi, skrivar Ritzau.

# Skerja 100 milliónir av íløgunum

**Tórshavnar býráð hevði á fundi í gjárkvøldið til viðgerðar fyrstu viðgerð av uppskoti til fíggjarlóg fyri komandi ár. Hon javnvigar við 656 milliónum móti 747 milliónum krónum í ár**

FÍGGJARLÓG

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Stabbamyndin sýnir langtíðar fíggjarætlanina hjá Tórshavnar kommunu. Sum sæst liggja íløgurnar javnt millum 130 og 140 milliónir krónur komandi árini*

Tað verður skorið munandi niður í íløgunum hjá Tórshavnar kommunu fyri komandi ár.

Meðan rakstrarútreiðslurnar vaksa góðar níggju milliónir, minka íløgurnar smáar 99 milliónir. Samstundis er talan um ein vøkstur í íløgum frá 2007 til 2008 við einari tvífalding, úr 147 milliónum upp í 257 milliónir krónur.

- Orsøkin til henda stóra vøkstur er, at tað tekur tíð at seta verkætlanir í verk. Tað skal nógv forarbeiði til, ikki minst projektering, og tí hevur ikki verið møguligt at sett tey arbeiði í verk, sum nú eru í gongd, fyrr enn nú, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Talan er ikki minst um stóru skúlabyggingarnar, sum eru farnar í gongd, tann við Løgmannabreyt og tann á Hamrinum á Argjum, verkætlanir, sum kosta um 400 milliónir krónur tilsamans.

Uppskotið til fíggjarlóg var sum nevnt fyri á býráðsfundi til fyrstu viðgerð í gjár, og har var uppruna uppskotið hækkað úr 617.692 milliónum upp í verandi 656.892 milliónir krónur, og var samtykt samsvarandi.

Rakstrarútreiðslurnar eru hildnar á 2008-støði tó við teimum hækkingum, sum neyðugar eru í sambandi við lønarvøkstur og tilíkt.

Inntøkurnar verða mettar til 604.796 milliónir, og síðani verða framfluttar góðar 39 milliónir frá í ár, sum ikki nýttar íløgur. Restin, góðar 12 milliónir, verður fíggjað við tøkum peningi.

### Skúlin kostar mest

Tórshavnar kommuna er í holt við eina munandi útbygging á skúlaøkinum, og tað verða eisini íløgur í skúlabygging, sum er nógv tann størsti posturin í íløgupakkanum hjá kommununi komandi ár. 87 milliónir krónur – ella væl meiri enn helvtin av samlaðu íløgunum – fara til skúlabygging, fyrst og fremst til skúlan við Løgmannabreyt og á Harminum á Argjum, men eisini Nonnuskúlin skal útbyggjast við nýggjum bygningi komandi ár.

Í heila tikið fyllir skúlabygging rættiliga nógv, eisini á langtíðarætlanini hjá Tórshavnar kommunu. Góðar 80 milliónir í 2010, 75 milliónir í 2011 og 60 milliónir krónur verða settar av í 2012.

Hinvegin verður lítið og einki gjørt við útbygging á barnaansingarøkinum. Tað eru serliga vegir og allarmest vatnveitingar, sum fylla nógv í langtíðar ætlanunum hjá kommununi. Eisini koma íløgur til eldraøkið við á langtíðar ætlanina frá 2011.

Barnaansingarøkið er so at siga fult útbygt, og tað er í sag eingin, sum ikki fær sítt barn ansað. Men kortini verður talan um nakrar minni byggingar komandi árini, sigur Heðin Mortensen.

Ítróttur og frítíðarvirksemi eru við á fíggjarlógini sum ein stórur postur komandi ár, og eisini í 2010 fær hesum postur rúmar ræsur. Men so sæst einki aftur til nakra útbygging aftrat innan ítrótt og frítíð í langtíðar raðfestingini.

### Aðrar útbyggingar

Hildið verður annars fram við ymsu útbyggingunum. Kloakkir hava fylt nógv í hesum valskeiðinum, og hildið verður fram við útbyggingunum á hesum økinum eisini komandi ár.

Hestur hevur fingið nýggja kloakkskipan, nógv er gjørt við at reinsa áirnar í Havn, og nú verður skipanin útbygd í Nólsoy.

Renovatión, Kirkjugarður og fríðkan av býnum fáa millum tvær og tvær og eina hálva millión, og barnaansingin og eldraøkið fáa ávikavist tvær og fimm milliónir krónur til útbygging.

Og at enda verða settar av fimm milliónir til framhaldandi gerð av Glyvursvegnum, 1.-4. stig.

Uttan fyri vanliga íløgukarmin liggur útbyggingin av smábátahavnum í kommununi, og fyri komandi ár verða avsettar fýra milliónir til hetta endamálið.

- Fíggjarstøðan er góð í Tórshavnar kommunu. Vit skylda ongar pengar og kunnu í prinsippinum lána eina heila álíkning, sum svarar til 600 milliónir, so ikki kann sigast annað enn, at tað stendur væl til í Havn, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri, um fíggjarlógaruppskotið fyri 2009.

# Eingin samanlegging enn

**Tórshavnar Býráð gjørdi eina kúvending í málinum um at leggja kommunufeløgini saman í eitt**

SAMANLEGGING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Umboð fyri teir báðar kommunufelagsskapirnir, Kommunuskipan Føroya og Føroya Kommunufelag, hava samráðst um stovnan av nýggjum kommunufelag, ið skal fevna um allar kommunur í Føroyum.

Ætlanin var eisini, at KommunalaArbeiðsgevarafelag Føroya í samráð við SEV og IRF verður tiið av samstundis, sum at virkisøkið verður lagt undir nýggja felagið.

Høvuðsendamálið er at savna orkuna og styrkja tað felags kommunalpolitiska arbeiðið, bæði í samskiftinum við landsmyndugleikarnar og í mun til at veita betri tænastur og ráðgeving til kommunurnar.

Partarnir vóru samdir um, at kommunurnar í framtíðini eiga at umsita øll málsevni av týdningi fyri borgaran, tí kommunurnar kenna tørvin hjá borgaranum best, og kunnu tryggja betri og skjótari tænastu.

Men á býráðsfundinum í gjárkvøldið fekk hendan ætlanin eitt rættiligt skot fyri bógvin, tí at sjálvt um býráðið samtykti at taka undir við tankanum um at skipa eitt kommunufelag, so varð málið kortini beint aftur í viðkomandi nevndirnar, tí málið ikki var greitt støðutakan.

- Talan var um ónøgd um, at Havnin fekk ov lítið burtur úr í mun til tað, sum vit lata, segði Heðin Mortensen um grundgevingina fyri avgerðini.



*Heðin Mortensen dugir ikki í løtuni at siga, hvussu spurningurin um samanlegging av kommunufeløgunum nú fer at enda*